

*Tey, sum í hesum døgum vitja vøkru Miðalhavsoynna, tí tað eru Oyggjaleikir, eru bara ein evarska lítil partur av samfelagnum, sum er upptikið av at tæna ferðafólkunum bæði úr vestara og eystara partinum av Europa*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Oyggjaleikir í skugganum

**Tað verður hugsað meiri um ferðafólk enn um Oyggjaleikir á kendu frítíðaroynni minni enn ein tíma frá turkiska fastlandinum, sum hevur søguliga verið partur í nógvum ymsum valdum**

**RHODOS**
*Jóannes Hansen*

Við búskaparliga vøkstrinum í eftir krígstíðini vant tað upp á seg at ferðast. Frítíðin hjá vestureuropearunum longdist, ráðini batnaðu, og møguleikarnir at ferðast skjótt og bíliga fjølgaðust.

Síðani í seksti árunum er horisonturin víðkaður, og Grikkaland og ikki minst griksku oyggjarnar eru vornar sera vanligt ferðamál. Herðashornini, sum ferðafólk leitaðu sær frá til eitt nú Rhodos sást aftur í búskapinum og vælstandinum. Í fyrstu atløgu vóru tað eitt nú skandinavar, týskarar, tey úr Benelux londunum og onglendingar. Nú hava eitt nú írar havt ráð at ferðast í nógv ár.

Síðani jarntjaldið skrædnaði, hava eystureuropear fingið luft fyri útlongslinum, og nú er tað so ofta, at russiskt, polskt og onnur mál eystan úr Europa eru at hoyra á Rhodos og hinum plássunum, har tað støðugt í tað mesta av einum hálvum ári er sól og heiður himin.

## Verttíðin og grannalagið

Á okkara breiddarstigum hevur arbeiðið søguliga verið lagt til rættis eftir landbúnaðinum og fiskarínum. Tiltikið hevur eitt nú verið, at føroyingar í fimmti og fram í seksti árini vóru í Íslandi í sildaverttíðini.

Týdningurin av sildini er minkaður í íslendska búskapinum. Fíggjarvinnan er saman við ferðavinnuni vorðin støðugt týdningarmiklari. Gongdin heima hjá okkum sjálvum ber á sama borðið, um enn tað ikki enn er komið so langt.

Á Rhodos vóru fiskaríið og landbúnaðurin týdningarmiklir vinnuvegin, inntil ferðafólkavinnan rættuliga tók dyk á seg. Tað eru framvegis tey, sum eru upptikin av fiskarínum og landbúnaðinum, har víndyrkingin hevur verið og er frammarlaga. Men nú er tað soleiðis, at aðrar vinnur á Rhodos hava sítt grundarlag í ferðafólkavinnuni.

Tað búgva eini hundrað túsund fólk á Rhodos, og tey og onnur, sum búgva har í verttíðini, tæna og vinna pengar burturúr ferðafólkunum, sum árliga knappast um hálva aðru milliónina!

Tað er frá apríl og fram til í oktober, at ársinntøkan verður vunnin. Hjá teimum innføddu eru summarmánaðirnir avgjørt ikki frítíðarmánaðir. Arbeiðsdagarnir eru langir hesa ársins tíðina, og tað er streivið at arbeiða í nógva hitanum. Tað er trot á arbeiðsmegi, og fleiri hava meiri enn eitt arbeiði.

Frítíðin kemur eina ferð í heyst. Tá verður veðrið meiri liviligt, enn tað er summarmánaðirnar, og tá fara tey innføddu at spenna frá og hugna sær á matstovunum úti og inni, sum tey nú tita aftur og fram í, meðan sveittin lekur av teimum.

Rhodos er tann størsta av dodekaneisku oyggjunum, sum eru eystur ímóti Turkalandi. Tað er bara ein lítil tími at sigla frá Rhodos og til turkiska frítíðarbýin Marmaris. Hesin túrurin hevur tey seinnu árini ofta partur av at halda frí á Rhodos. Soleiðis hevur tað ikki altíð verið.

Nú er grannalagið millum Grikkaland og Turkaland ikki so galið. Síðani turkisku innrásina á Kypros í 1974 hevur talan ikki verið um rættiligar samanbrestir millum grannarnar, men grannalagið hevur ikki verið hjartaligt. Grikkaland og harvið Rhodos er limur í ES, sum Turkaland fegið vil verða partur av, og bæði Grikkaland og Turkaland eru limir í NATO.

## Søgan

Rhodos liggur í heimsins nalva. Í hvussu so er tá ið hugsað verður um tann heimin, har mentanir og politiskt vald hava verið eyðsýnd og stinn í søguligari tíð.

Gamli býarparturin í Rhodos býi á norðara partinum av oynni sigst vera elsti varðveitti miðalaldarbýurin í Europa. Hann er hugnaligur við smølum grýtum og gøtum, og her hómast í arkitekturi og umhvørvi kjalarvørrurin eftir ymsu valdini, sum í søguligari tíð hava havt síðsta orðið at siga her á leið.

Nú er Rhodos partur av Grikkalandi. Í hesum umfarinum er hesin veruleikin bara seksti ára gamalur. Tað var ikki fyrrenn í 1947, at Rhodos gjørdist partur av Grikkalandi. Frammanundan hevði oyggin í fleiri hundrað ár verið partur av Turkalandi, og eisini hevur Italia havt ræðið á Rhodos.

Í gamlari tíð segðist Rhodos hava góð evni at halda seg væl við tey, sum sótu ovast á valdspyramiduni. Tá ið Aten var omaná, helti Rhodos seg til Athen. Tá ið Sparta var omaná, helti Rhodos seg til Sparta, og tá ið persarnir eitt skifti vóru stóru menninir í hesum økinum, so helti Rhodos seg til teirra. Tað eru íslett eftir ymsu valdsharrunum og teirra mentanum, sum síggjast eitt nú í gamla partinum av Rhodos býi.

Nú eru Oyggjaleikir á Rhodos. At tað ljóðar frá umboðsmonnunum hjá Sosialinum á Rhodos, at tað higartil hevur verið lítið at sæð og kent til, at tað eru Oyggjaleikir, kemur ikki óvart á. Eitt nú í Føroyum, í Hetlandi og í Gibraltar verður lítla samfelagið mest sum endavent, tá ið talan er um Oyggjaleikir. Samfeløgini eru lítil og viðurskiftini smá.

Soleiðis er ikki á Rhodos. Tey, sum í hesum døgum vitja vøkru Miðalhavsoynna, tí tað eru Oyggjaleikir, eru bara ein evarska lítil partur av samfelagnum, sum er upptikið av at tæna ferðafólkunum bæði úr vestara og eystara partinum av Europa. Tað eru hesi, sum eru inntøkugrundarlagið undir samfelagnum.

Hetta vil ikki siga tað sama, sum at samfelagsligu fyritreytirnar undir leikunum eru vánaligar. Als ikki. Størsta mótstøðan verður heilt víst hitin. At stríðast og kappast, tá ið hitastigini eru á veg upp ímóti teimum fimmti, eigur ikki at vera serliga hugaligt!

Vit røkka eisini á Rhodos! Góðar oyggjaleikir

Gevið gætur! Dagført prísyvirlit fyri reiking í útlandinum er á www.kall.fo. Tá ið tygum kalla, verður hjá nógvum veitarum rindað pr. minutt og ikki sekund. Havast skal í huga, at prísirnir eru vegleiðandi. Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í valutakursum, nær tosað verður og útlendsku veitarunum.

kall HANDILIN
Tórshavn Óðinshædd • SMS Klaksvík Klaksvíksvegur 77 Saltangará Heiðavegur 32
www.kall.fo

kall 20 20 20

TEAM85

Sosialurin